gult2 cyan2 magenta2 svart2




# YVIRLÝSING

**í sambandi við at samráðingarnar við Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag eru slitnaðar:**

*Undirritaðu feløg skulu við hesum boða frá, at hóast partarnir so at siga als ikki hava tosað um sjálv lønarkrøvini, so avgjørdu arbeiðsgevararnir at slíta samráðingarfundin og boðsenda semingsstovninum.*

*Fyri okkum er eingin ivi um, at hetta er tekin um, at arbeiðsgevararnir ikki hava áhuga í at royna at finna eina semingsloysn við samráðingum millum partarnar, og vit meta ikki tað tænir nøkrum av pørtunum, at annar samráðingarparturin soleiðis kastar frá sær áðrenn verulig gongd er komin á lønarsamráðingarnar.*

*Vit skulu í hesum sambandi vísa á, at tað er sera umráðandi, at limirnir í feløgum okkara neyvt fylgja galdandi sáttmála, eisini tá talan er um arbeiðstíðir, tí í einari støðu sum hesari, tá vandi er fyri arbeiðssteðgi, tá vísa royndir okkara, at ikki allir arbeiðsgevarar fult út halda galdandi arbeiðstíðir, hetta fyri at arbeiða undan rávøruna, áðrenn møguligur arbeiðssteðgur verður settur í verk.*

Tórshavn 01.05.2001

**FØROYA ARBEIÐARAFELAG**
**HAVNAR ARBEIÐSKVINNUFELAG**






**Vitjið felgu- og dekkframsýning okkara!**

*Í sambandi við at felagið Føroya MC skipar fyri MC-boggie-túri á motorsúkklu leygardagin og enda túrin á Super Dekk kl. 16.30, hava vit opið frá kl. 13.00, har vit sýna fram dekk og felgur.*

*Eisini verður pylsuvognur, har høvi verður at keypa pylsur og annað at leska sær afturvið.*

SUPER DEKK

**Hoyvíksvegur 66**
**Tel. 314975**


# Fyrstu næmingarnir á skúlabonk

**Mánadagin byrja fyrstu næmingarnir á nýggja almanna- og heilsuskúlanum í Suðuroy**

SKÚLASKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Nú er loksins komið hartil, at tað er klárt hjá fyrstu næmingunum at byrja á nýggja almanna- og heilsuskúlanum í Suðuroy.

Skúlagongdin byrjar mánadagin og í tí sambandinum verður móttøka í húsinum sama dag, har mentamálaráðharrin, Torbjørn Jacobsen, skúlastjórin, Bergljót Ihlen og skúlleiðarin, Susanne Høgh Olesen, fara at siga nøkur orð um skúlan.

Eftir móttøkuna, verður opið og veruliga skúlagongdin byrjar so týsmorgunin.

Tey, sum byrja á skúlanum nú, eru 20 heimahjálpir, sum skulu til uppskúlingar. Hetta er ein útbúgving uppá 26 vikur fyri fólk, sum hava verið heimahjálpir í eina tíð, men sum ikki hava tað ástøðiligu úbúgvingina. Í útbúgvingini eru mæmingarnir í starvsvenjing í gott helvtini av tíðini.

Talan er um heimahjálpir úr øllum landinum. Søkjast skuldi ikki til hesa útbúgvingina, tí tað eru deildirnar innan heimarøktina í teimum ymsu økjunum í landinum, sum sjálvi senda heimahjálpir í skúla. Hesuferð eru fýra heimahjálpir úr Suðuroy í skúla, tvær úr Sandoy, fýra úr Tórshavn, fimm úr Eysturoy, tríggjar úr Vágum og Vestmanna og fýra úr Norðoyggjum á skeið.

## Byrja aftur í september

Annars byrjar sjálv útbúgvingin til Almanna- og heilsuhjálpara triðja september. Hetta er ein útbúgving, sum varar í eitt ár, har tey eru í starvsvenjing ein partur av skúlatíðini.

Stórur áhugi var fyri at sleppa inn á skúlan, tí tey fingu heilar 58 umsóknir. Umleið helvtin av umsøkjarunum vóru úr Suðuroy og hin helvtin var úr landinum annars.

Men tað sleppa bara 24 inn á skúlan. og av tí, at talan er um ein skúlafyri alt landið, eru næmingarnir sjálvsagt eisini úr øllum landinum.

– Tað var sera trupult at taka dagar ímillum umsøkjararnar, tí teir vóru væl skikkaðir, men vit hava so latið teir frægast skikkaðu umsøkjarnar inn á skúlan.

Treytin fyri at sleppa á skúlan, er, at umsøkjari antin hevur prógv úr 9. flokki, umframt arbeiðsroyndir, ella hevur 10 flokk. Men tað ber eisini til hjá øðrum at søkja enn teimum, sum ikki hava 9. flokk, men teir skulu so eisini hava aðrar fortreytir, eitt nú aðra skúlagongd og so verður í hvørjum einstøkum føri mett um førleikan at taka útbúgvingina.


Lesið
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri pápi okkara

**Tummas Enok Hansen**
**Vestmanna**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávu til kirkjuna og til tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Børnini**

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, sum tóku lut í stóru sorg okkara, tá elskaði sonur og lítli beiggi okkara

**Allan Sivanantham Jacobsen**
1.10.1994–20.3.2001

so brádliga varð tikin heim til Harran.
Takk fyri vitjanir, brøv og telefonsamrøður.
Takk til Dánial á Dul Jacobsen og Poul Færø fyri troystarrík orð í kapellinum og í Zarepta.
Takk til Annu Háberg fyri sangin, Regin Guttesen og Martin Simonsen fyri klaver- og orgulspæl.
Takk fyri blómur, kransar og minnisgávur. Eisini takka vit hjartaliga samkomuni í Kedron fyri alla hjálp og øðrum, sum hjálptu til við ervinum.

**Anetta, Sri, Sitha og Alexandur**

Sum fostur sóu eygu tíni meg, og í bók tíni stóðu teir allir uppskrivaðir, dagarnir, ið ásettir vóru, áðrenn nakar av teimum enn var komin.
*Sálm. 139,16*

gult3 cyan3 magenta3 svart3



# Klaksvíkingar á fundi í Odense

**Umboð fyri Klaksvíkar kommunu hava verið á fundi í Odense fyri at tosa um, hvat vinarbýarsamstarvið skal brúkast til**

SAMSTARV
*Eyðun Klakstein*

Klaksvík: Fríggjadagin var fundur í Odense um vinarbýarsamstarvið, sum er millum Odense, Klaksvík og aðrar býir úr Norðurlondum.

Evni á fundinum var framtíðini hjá hesum samstarvinum, og hvørjir møguleikar liggja í tí.

– Vit hava góðar royndir á skúlaøkinum, tí har er nógv hent seinnu árini, men vit vilja hava meiri burturúr á øðrum økjum eisini, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Saman við honum eru eisini John Færø, býráðsskrivari, Jórun Høgnesen, formaður í mentanarnevndini, og Asbjørn Lómaklett, skúlastjóri, við á fundinum.

Samstarvið millum býirnar skal eftirmetast og kannast.

– Vit skulu finna út av, um vit veruliga fáa nakað burtur úr samstarvinum, og hvussu vit skulu skipa tað framyvir, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Umboðini úr Klaksvík fóru av landinum hósmorgunin, og tey verða aftur longu í dag.

# Vilja hava lokalfeløg at samstarva

**Norðoya Tjóðveldisfelag heitir nú á hini politisku lokalfeløgini í Norðoyggjum um arbeiða saman um mál av felags áhuga**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Klaksvík: Norðoya Tjóðveldisfelag hevur nú tikið ítøkilig stig til, at politisku lokalfeløgini í Norðoyggjum fara at samstarva.

Í einum brævi, sum er sent øllum politisku feløgunum í Norðoyggjum, leggur Norðoya Tjóðveldisfelag upp til tvørpolitiskt samstarv á teimum økjum, sum eru serliga átrokandi fyri Norðoyggjar.

– Mál sum Klaksvíkar Sjúkrahús, undirsjóvartunnil, eldrarøkt og KT-vinna eru eftir okkara tykki uppløgd evni at taka til viðgerðar tvør- og lokalpolitiskt, sigur Norðoya Tjóðveldisfelag.

## Uppskot um evni

Norðoya Tjóðveldisfelag heitir á hini lokalfeløgini í Norðoyggjum um at koma við hugskotum um samstarvsøki sum skjótast og innan 22. mai.

Síðani ætlar tjóðveldisfelagið at kalla inn til ein felagsfund, har allar nevndirnar møta.

– Tað er okkara vón og ynski, at feløgini, hóast tey eru ymisk, kunnu samstarva Norðoyggjum at frama, sigur Norðoya Tjóðveldisfelag.


VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820



# Príslækking - enn einaferð!

**-16%**

**á fastnettelefoni innanlands**

Nú kostar tað einans **32 oyru** um minuttin um dagin og **22 oyru** um minuttin um náttina at siga tað um fastnettelefonina innanlands.

**upp til -44%**

**á fastnettelefoni til útlond**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*

**Tilboð beint nú!**

**ÓKEYPIS stovning av internethaldi**

SPAR 400,00 kr.

*Beint nú er tað **ókeypis** at stovna eitt internethald hjá Føroya Tele. Tilboðið er galdandi til 1. august 2001.*

Føroya Tele • Postboks 27 • 110 Tórshavn • Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • e-mail: ft@ft.fo • www.tele.fo

petur & petur • 320870